# Tekniski Skúlin á Gongugøtuni

Fríggjadagin skipar Tekniski skúli í Havn fyri stórum tiltaki í Gongugøtuni. Millum fara næmingar á skúlanum at sýna fram nakað av tí, sum teir hava tikist við seinasta skúlaskeiðið.

Talan er um handverk í breiðum týdningi, og eru soleiðis bæði hármóti, timburarbeiði og bilar á skránni. Alt handverk, sum er framleitt av næmingunum á skúlanum.

Tiltakið í Gongugøtuni byrjar klokkan 12.



*Hesin bilurin telist millum tað, sum næmingarnir á skúlanum hava framleitt skúlaskeiðið*

# Gikta-café í MBF-húsinum

Í kvøld verður fyrsta av ætlandi fleiri café-kvøldum, sum Giktafelagið nú fer at skipað fyri.

Hetta fyrsta tiltakið veður í MBF-húsinum í Havn, og byrjar tiltakið klokkan 19.30.

Eydna Fosaa leggur fyri við at tosað um evnið »at liva við pínu«,og síðani verður lagt upp til kjak og tos, har orðið er frítt.

**-mørk**

# Nýggir partaeigarar í Sparikassanum

Á aðalfundinum í Føroya Sparikassa fyri góðari viku síðani, varð upplýst, at Sparikassin hevur fingið tveir nýggjar partaeigarar, sum hvør sær eiga eitt prosent ella meira av partapeninginum. Nýggju eigararnir eru P/F 14, ið er felagið, sum í mong ár átti Tórshavnar Skipasmiðju, og íslendski sparikassin, Spron.

Orsøkin til, at hetta varð upplýst, var, at partaeigarar, sum eiga eitt prosent ella meira hava rætt at velja sær ein lim í umboðsráðið. Hesum møguleika tók P/F 14 av, og hevur felagið valt Kjartan Mohr úr Havn í umboðsráðið.

**-mørk**

# Stórur lønarvøkstur

Sammett við februar mánað í fjør øktust føroysku lønarútgjaldingarnar í ár við 10,9%

Tað tykist, sum er góð ferð á føroyska búskapinum. Lønarútgjaldingar plaga at vera eitt gott barometur í so máta, og tær eru í øllum førum vaksandi.

Sammett við februar mánað í fjør var vøksturin knøpp 11 prosent, og hetta er størsti vøksturin í fýra ár.

Tað er serstakliga innan privatu vinnuna, at talan er um vøkstur. Fiskivinnan stendur fyri største vøkstrinum, men eisini innan handil, flutning, fígging, trygging og vinnuligar tænastur annars, hevur talan verið um stóran vøkstur.

Higartil í ár hevur vøksturin verið 8,4% sammett við 2005.

**-mørk**

Starvslýsing www.runavik.fo



## Leiðari til barnagarðin á Mýrunum

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðara í farloyvi, frá 1. mai 2006 til 1. apríl 2007.

**Um Barnagarðin á Mýrunum**
Barnagarðurin á Mýrunum er kommunalur stovnur undir Runavíkar kommunu. Barnagarðurin er normeraður til 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum, 3 barnagarðsstovur við 18 børnum og ein barnagarðsstova við 12 børnum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum, rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

Á stovninum starvast íalt 35 starvsfólk.

**Starvið**
Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Leiðarin hevur ábyrgd av:

- at stovnurin er í støðugari menning,
- at starvsfólk trívast og mennast,
- at tað støðugt verður arbeitt við at menna námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og treytunum, sum stovnurin virkar undir.
- At samstarva við kommunalu umsitingina, við aðrar leiðarar innan barnaansingina og við aðrar viðkomandi stovnar

**Vit leita eftir leiðara, ið**

- er útbúgvin námsfrøðingur
- hevur leiðsluroyndir
- er nýhugsandi og ígongdsetandi
- hevur góð samstarvsevni
- evnar at eggja og menna starvsfólkið
- hevur góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya á lønarstig 24-30

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000 ella Fríðu Lómstein, barnagarðsleiðara á tlf. 448254 ella 218254

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi hósdagin 29. mars 2005, kl. 12:00.

**Umsóknin skal sendast til:**
Runavíkar Kommuna
Sosiala deild
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-600 Saltangará

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

**Runavíkar Kommuna**
*...ein kommuna í menning*